# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**3. sunnudag eftir páskir**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri Joensen. ***Talvan gongur fyri Bláa Kross***
***Kirkjubøur:*** kl. 12.15 altarg. Heri Joensen
***Kaldbak:*** kl. 12 Sverri Steinhólm. ***Sjónvarpið tekur upp***
***Havnar kirkja:*** Kl. 11 Sonja Klein
***Sandavágur:*** kl. 11, kirkjan fyllir 90 ár, David Johannesen og Inga Poulsen Dam
***Skála:*** kl. 11 Jógvan Fríðriksson
***Funningur:*** kl. 11 messa Emil Olsen
***Gjógv:*** kl. 12.30 messa Emil Olsen
***Gøta:*** kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
***Glyvrar:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð, altargangur
***Christianskirkjan:*** kl. 11. Kórið hjá Jóhan Mortensen syngur, Magnus Brahé Jørgensen
***Viðareiði:*** kl. 12, altarg., Elsa Funding
***Skúvoy:*** kl. 12, altargongd, Jákup R. Hansen
***Øravík:*** kl. 11, Jónsvein Bech
***Porkeri:*** kl. 12, Patrick de Neergaard
***Sumbiar kirkja:*** kl. 11 v. Jette Paarup

**Matiné í Havnar kirkju**
Leygardagin 28. apríl kl. 11.30 verður matiné við Sámal Petersen, violin og Ragnar Olsen, gittara. Verk eftir m.o. Bach og Giuliani.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliukransking. Kl. 11 gudstænasta, J.V. Danielsen.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Kl. 12 Sunnudagsskúli
Sunnukvøldið kl 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hósdagin kl. 18 hevur MiniSalt hugnakvøld; tilmelding á telefon 284446 ella 596747.
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti við luttøku frá háskúlanum í Mariager.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla Kent Jacobsen talar, kl 18 evangeliskt møti.
http://www.gospel.fo

**Fríkirkjan Oasan, Kirkjustræti 4**
Hósdagin kl. 20 ungdómsmøti v/Leivur Steintún.
Fríggjadagin kl. 7 bøn.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti, Ekklesia luttekur við talt, vitnisburði og sangi.
Mánakvøldið kl. 17.15- 18 venur barnakórið. Kl. 19.30 fyrilestur v/Steen Palmquist evni: Smá børn í familjuni. Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 29. apríl:
Kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing
Kl. 11.30 Samvera við drekka
Kl. 12 Sunnudagsskúli og møti. Kristina Frost frá Mariager talar.
Boðskapur hennara verður serliga til ungdómin.
Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Lívdin á Brekku 3**
Fríggjakvøldið kl 20.30 talar Absalon um evnið »Hvat hevur tú í hondini«
**Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla**
kl. 10.30 Familjumøti har Massoud Fouroozandeh talar.
Kl. 11.30 samfelagsløta
Kl. 12 Á Tilbiðjunarmøtinum hevur Anna Háberg um »Ein ferð í lovsongi«.
Undir báðum møtinum er barnaansing fyri børn undir skúlaaldur.
Kl. 12 Sunnudagsskúlin.
Møtini kunna hoyrast beinleiðis á www.livdin.fo
Týskvøldið kl 20 Bøn og bønarskúli á Brekku 3
Vit bjóða øllum at vera vælkomin.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hóskvøldið 26. apríl
kl. 20 Bíbliutími við Hera Tróndheim (1. Kor. 7. kap.)
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti við Suna Justinussen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18 Filmurin »Hellan« verður sýndur. Sólbjørg Mortensen greiðir frá filminum.
Mánadagin 30. apríl kl. 20 Sjómanskvinnuringurin kemur saman.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Hósdagin kl. 20 Heimaforbundi.
Sunnudagin kl. 11 og 18, Møti, Egin og Marita Hendriksen tala. Sunnudagsskúli kl.14.

**Aglow, Havn**
Leygarkvøldið 28. apríl kl. 19.30 Aglowfundur fyri kvinnur í Miðlahúsinum, Lissi Hansen talar um evnið »Happing«.
http://www.aglow.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v. Alfred Petersen.
Leygardagin kl. 9.30 Foreldur og børn.
Sunnudagin 29. apríl kl. 14 er ommu og abbadagur í Sunnudagsskúlanum.
Sunnudagin kl. 18 Møti v. Regin Olsen, Ungdómskórið syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin 26. apríl Í KFUK: Hugnakvøld.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygardagin kl. 21 Flare - luttøka frá PVH (Pinse Vekkelsens Højskole).
Sunnudagin kl. 10.45 Møti - luttøka frá PVH, kl. 11.30 sunnudagsskúlin.
www.filadelfia.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hóskvøldið kl. 19.30 heldur finn Arvé prestur, fyrilestur í Mariukirkjuni. »Da Vinci Loyndarmálið«. Hvat hevur tað við H. C. Andersen og Benedikt Pave at gera? Komið og hoyrið. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa við Finn Arvé, prestur í Mariukirkjuni. Kl. 14 Sunnudagsskúli.
www.katolsk.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20. Møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni.
Kl. 18 Møti við Sverra Kass.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Dýrabiðidagsstevna verður í døgunum 4.-6. mai 2007. Skipað verður fyri evangel. møtum, og syngið við kvøldi, við luttøku ymsastaðni frá í landinum. Serstakt ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 23. Vit bjóða vælkomin til stevnuna.

**Saron Vestmanna**
Sunnudagin 29/4 morgunmøti við breyðbróting kl. 11.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Í samband við Kollafjarðarlegu í Nesvík verður skipa fyri ungdómsmøti í Nesvík fríggjakvøldi kl. 22.00 við luttøku úr Havn og av Glyvrum har øll eru vælkomin.
Sunnudagin verður sunnudagsskúlin í Leguhúsinum í Nesvík kl. 14. og møti verður í Missiónshúsinum kl. 18 Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20. Øll eru vælkomin til øll tiltøkini.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Hósdagin kl. 16 Liljur.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin

**Keldan, Skálafirði**
Hóskvøldið kl. 20, Awake.
Sunnudagin kl. 17 møti.
Barnamøti kl. 17.
Fólk frá Bíbliuskúla úr Mariager luttaka bæði kvøldini.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Bønhúsið á Hellunum**
Sunnudagin 29. apríl kl. 20 Møti, talarar Sylverius Jacobsen, Petur Nolsøe og Henry Jarnskor. Meinigheitskórið í Gøtu luttekur. Øll vælkomin.

**Missiónsvikan við Gjógv**
Fríggjakvøldið 27. apríl Møti kl. 20 við Jónhildu og Gullak.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti við Meinigheitskórinum úr Havn.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Niels Jacob Nielsen. Jónhilda og Gullak syngja.

**Evangeliskt møti**
verður í Losjuni í Gøtu v/ Tórmund Hansen og fleiri leygarkvøldið 28.4. kl. 20. Herman, Gigga og fleiri syngja.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 17 verður familjumøti, barnakórið av Skála luttekur,
aftaná verður nátturði.
kl. 21 verður ungdómsmøti við Henry Christiansen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl.20.30 er ungdómsmøti við Jón á Borg og Malmberg Olsen.
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn.
Sunnudagin kl.14.00 er møti, sunnudagsskúli er samstundis.
Hvønn gerandismorgun. kl. 6:15 er morgunbøn.

**Kfum og Kfuk Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarløta. Kl. 18 Møti.
Ungdómsmøti kl. 21 við Torben Østermark.
Øll eru vælkomin.
www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Lovsangur og bøn, kl. 18 Møti v/ Thomas J. Askham og Hjalgrím Davidsen. Innsavnan til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Sunnudagsskúlin er nú fluttur til kl. 10.30 og møti verður kl. 18.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Fríggjakvøldið 27. apríl verður ungdómstreff í Missiónshúsinum á Tvøroyri kl. 22.
Leygarkvøldið 28. apríl verður ungdómsmøti kl. 21 í Missiónshúsinum í Porkeri.
Bæði kvøldini luttaka ung av Strondum. Øll eru hjartaliga vælkomin!
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Kl. 18 Møti við Josvein Hovgaard.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hósdag kl. 20 Bønarløta. »Kom við og bið!«
Fríggjadag kl. 20 Ungdómsmøti undir heitinum »Plantan!« Ver vælkomin - hóast tit ikki eru ein partur av samkomuni, ella ikki eru von at ganga á møti.
Leygardag kl. 15 Andakt í sambýlinum í Vági.
Sunnudag kl. 11 Halgunarmøti. Kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarløta. Kl. 18 Evangeliskt møti. Hallur Ludvig og Eddie Bech skipa fyri. www.frelsunarherurin.fo

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 18 Møti, kl. 13.30 Sunnudagsskúli.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Møti verður í Missiónshúsinum í Porkeri sunnukvøldið kl 18. Jóannes Mortensen talar og Streingjakórið syngur. Innsavning verður til Heimamissiónina.

**Felagið Tórshavn, gongutúr**
Sunnudagin 29. apríl verður farið niðan á Ritafjall, túrurin er tungur og gingið verður í brattlendi í støðum. Farið verður við bussi frá Kunningarstovuni kl. 10. Minst til at hava góð og heit gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding 302425.

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Gongutúrur út á Borðoyarnes verður sunnudagin 29. apríl. Vit møtast við vatnbrunnarnar á Uppsølum (oman fyri tyrlupallin) kl. 14. Miðaltúrur.

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Heilafelagið**
Skrivstovan er opin hvønn mikudag frá kl. 19-20.
*MBF-húsið kjallarin Inngongd frá Landavegnum Tlf. 321520.*

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Mánadagin 23. apríl***
kl. 10-10.30 Fimleikur
kl. 11-11.45 Enskt á byrjunarstigi, eftirmeting
kl. 14-17 Kortspæl og onnur spøl
***Týsdagin 24. apríl***
kl. 10-11.30 Sangur, Simme Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 ***Niðurstøðan av verkætlanini hjá Fø. Kommunufelag, »Okkara lív sum eldri«.*** Eyðun Kristiansen, verkætlanarleiðari, Sveiney Sverrisdóttir, skrivari
***Mikudagin 25. apríl***
***Flaggdagin er stongt.***
***Hósdagin 26. apríl***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 27. apríl***
kl. 10-17 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Landsfelag Pensjónista**
Felagið heldur til í Tróndargøtu 13, Tórshavn. Skrivstovan er opin hvønn týsdag frá kl. 13.00-16.00. Tlf. 319394 ella 219394.
LP@email.fo

**Dagtilhaldið í Gøtubrá, Gøtu tlf. 441662**
Opið týsdag kl. 15-18.

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18.00
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv.*
*Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Vesturskin**
***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.
*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
er opið týsdag til hósdag, kl. 15-18.
***Týsdag*** ymisk spøl.
***Mikudag*** ítriv v/ Rigmor.
***Hósdag*** fimleikur v/ Áshild.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi**
*í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.*
*Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.*
*Opið mánadag til fríggjadag kl. 15.00 – 18.00.*
***Skrá vika 17***
***Mánadagur 23. apríl.***
Fimleikur. Felagssangur.
***Týsdagur 24. apríl.***
Opið hús.
***Mikudagur 25. apríl.***
Flaggdagin er dagtilhaldið stongt.
***Hósdagur 26. apríl.***
Opið hús.
***Fríggjadagur 27. apríl.***
Boccia.
***Vit minna á, at leygardagin 19. mai er Eldradagurin 2007 í Ungmannafelagshúsinum í Samljóð í Skopun. Allir pensionistar eru vælkomnir. Kostnaður. Vit ætla okkum at fara. Hevur tú hug at koma við? Tú kanst eisini tekna teg í Fløvanum.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks, somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag kl 14 –17. Báðar dagarnar er drekkamunnur at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum.**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá kl.15-18.